Góðan dagin øll somul

“Politikkur er úrslit. Úrslit er týdningarmiklari enn alt annað. Tað er við úrslitunum, at tú broytir og ávirkar. Úrslit er lívsnervin í politikki”.

Orðini eigur grøna eldsálin í danska Javnaðarflokkinum, Svend Auken nakrar fáar mánaðir, áðrenn hann tapir stríðið ímóti krabbameini. Svend Auken var eitt høvd hægri enn tey flestu. Hansara politiska útsýni var breiðari og bjartari enn hjá teimum flestu. Hann hevði altíð úrslitið fyri eyga. Og tá ið hann skal rógva aftur síni egnu politisku úrslit, fylla úrslitini á umhvørvis- og orku økinum nógv. Og tað er ikki so undarligt. Øll nítiárini gongur eldsálin á odda og fær sett varandi orku og vindmyllur á breddan.

***

Arbeiðið við at vinna orku burturúr vindi hevur mangan havt mótvind í Føroyum. Tað er sera gleðiligt at ættin nú er skift soleiðis, at vindorka veruliga hevur undanvind. Grøna kósin í Føroyum er eitt úrslit av einum skilagóðum samstarvi millum landsins myndugleikar og SEV. Vit mugu heldur ikki gloyma grønu slóðararnar, sum hvør í sínum lagi hava ávirka gongdina á orkuøkinum seinastu áratíggjuni. Seta vit okkum mál, fáa vit úrslit. Flotta umhvørvisheiðurslønin hjá Norðurlandaráðnum, sum vit hátíðarhalda í dag, er eitt úrslit av skilagóðum raðfestingum og íløgum.

Sjálvur var eg so heppin at vera í Hørpuni í farna mánaði, tá SEV fekk handa umhvørvisheiðurslønina. Vit vóru øll sera errin av avrikinum hjá tykkum. Errin av at vera partur av einari tjóð, sum hevur ment seg nógv á orkuøkinum seinastu árini. Errin av at vera partur av einari tjóð, sum torir at seta sær so greið og høg mál á økinum.

***

Samgongan hevur sett sær sama mál sum SEV, at í 2030 skal øll orka á landi koma frá varandi orku. Hesum máli røkka vit bara, um vit samstarva. Samstarva um at gera Føroyar til ein reinorkubúskap. Samstarva um at gera okkum minni bundin av olju. Samstarva so vit gerast minni viðbrekin, tá ið oljuprísirnir aftur veksa.

***

Nakrar mánaðir, áðrenn Svend Auken leggur árarnar inn, vinnur hann uppiborið ársins vindmylluprís fyri sítt áhaldandi og ótroyttiliga arbeiði á umhvørvis- og orkuøkinum. Fyri hann snúði politikkur seg um

úrslit. Ikki um góð fólkatingsval, ráðharrasessir ella persónliga umrøðu. Og júst úrslit eiga at vera lívsnervin í okkara orkupolitikki. Úrslit røkka vit í felag.

Vit hava øll í felag sett okkum sum mál, at í 2030 skulu 100% av orkunýtsluni á landi stava frá varandi orkukeldum. Tað er mín vón, at vit kunnu røkka hesum máli í felag. Grøna kósin er sett, og nú halda vita hana!

Hjartaliga til lukku við heiðurslønini enn einaferð og blíðan byr!

Aksel V. Johannesen, løgmaður